gult cyan magenta svart



# –Vit hava eina klokkuklára avtalu við danir

**Anfinn Kallsberg, løgmaður heldur ikki, at tað eru tvær meiningar um undirgrundaravtaluna í tí politisku skipanini í Føroyum, og er hann fullvísur í, at hann kann tala vegna alla ta politisku skipanina, bæði samgongu og andstøðu.**

UNDIRGRUNDIN
*Jan Müller*


*Anfinn Kallsberg, løgmaður ivast onga løtu í, at allir politiskir flokkar eru samdur um, at ráevnini í undirgrundini eru føroysk sambært avtaluna við danir*

– Fyri mær er eingin ivi um hesi viðurskiftini. Tað er púra klokkuklárt. Vit hava gjørt eina avtalu við donsku stjórnina í 1992, sum er galdandi fult út. Tað er tí als eingin ivi um, at tað eru føroyskir myndugleikar, sum hava bæði lóggávu- og ábyrgdarøkið og alt sum hartil hoyrir sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður í viðmerking til mongu søgurnar, sum hava gingið í seinastuni í fjølmiðlunum um avtaluna, sum varð gjørd millum Føroyar og Danmark í 1992 um ráevni í undirgrundini.

– Alt heldur uppat, um farið verður at sáa iva um hesar spurningar, nú vit føroyingar hava gjørt bæði skatta- og loyvislógir mótvegis oljufeløgunum. – Vit hava gjøgnumført eina lóggávu, og tað skal als ikki vera nakar ivi um, at vit hava kompetansan á økinum.

Men hvat sigur løgmaður til úttalilsi frá føroyskum politikarum um, at avtalan við danir er bara galdandi soleingi danir vilja tað, og at hon byggir uppá, at undirgrundin bara er til láns?

– Nú skal man ansa eftir ikki at fara inn í politiskar snildir í slíkum máli sum hesum. Tað er alt ov týdningarmikið til tess. Vit hava brúk fyri stabiliteti og tryggleika. Tí skulu teir vit hava latið loyvi til at gera kanningar og nú eisini boring her hjá okkum ikki á nakran hátt fara at ivast í, at føroyskir myndugleikar ikki hava fulla kompetansu á økinum.

Anfinn Kallsberg heldur ikki, at tað eru tvær meiningar um hetta mál í tí politisku skipanini, og er hann fullvísur í, at hann kann tala vegna alla ta politisku skipanina, bæði samgongu og andstøðu.

Men hvat sigur løgmaður so til, at eitt nú hansara egnu samgongufelagar gjøgnum árini hava sáað ivað um virðið av avtaluni og víst á, at hon er ikki bindandi nokk fyri danir!

– Sjálvandi er tað soleiðis, at tað í politisku telvingini hava verið mong argument frammi. Nógvar ósemjur hava verið um, hvat okkara skipan byggir á. Men vit mugu staðfesta, at vit hava havt eina lóg, sum vit hava bygt bæði okkara løgting og okkara landsstýri á síðani 1948. So kann ein tjakast um, antin ein er fyri henni ella ímóti. Men hon er so galdandi til nakað annað er avtalað ella avgjørt.

# Sissar oljufeløg

**– Tað er ótrúliga óheppið fyri trúvirðið hjá tí nýggju føroysku oljuvinnuni, at ivi nú verður sáddur um undirgrundaravtalun a frá 1992 sigur løgmaður**

UNDIRGRUNDARAVTALA
*Jan Müller*


*Tá Atli Dam, fyrrv. Løgmaður og táverandi danski forsætisráðharrin Poul Schluter undirskrivaðu undirgrundaravtaluna*

Nú tað er sáddur ivi um undirgrundaravtaluna millum Føroyar og Danmark vil Anfinn Kallsberg, løgmaður fegin sissa øll tey oljufeløgini, sum hava gjørt stórar íløgur í Føroyum og sum nú skulu til at fara undir leiting fyri milliardir av krónum.

– Eg vil fegin geva tann boðskapin frá eini samlaðari politiskari skipan, at tað finnast ikki tvær meiningar um hesar spurningarnar.

– Men hvørja viðmerking hevur løgmaður til, at ein fyrrverandi embætismaður í Tinganesi, sum hevur verið við til at ráðgeva í týðandi málum í Tinganesi, nú alment sáar iva um júst ognarrættin til nettupp tær oljuinntøkur, sum her verður tosað um?

–– Umrøddi persónur er ikki longur í starvi hjá landsstýrinum og hann hevur heldur ikki úttalað seg sum politiskur talsmaður fyri nakra skipan so vítt eg havi fingið upplýst, tá eg havi spurt um tað. Úttalilsi hansara byggja haraftur-ímóti á eina uppgávu hann hevur gjørt undir útbúgving.

Nú Ekstrabladet hevur gjørt so nógv burtur úr undirgrundaravtaluni heldur løgmaður fyri, at fjølmiðlar fara helst eftir eini góðari søgu og helst eisini eftir konfrontatiónum. – Vit síggja jú bæði føroyskar og danskar politikarar vísa á, at teir eru skeivt endurgivnir í pressuni og føla seg at verða misbrúktar o.a. Tað er væl ikki annað enn tað, sum oftani hendir, men tað er ótrúliga óheppið fyri trúvirðið hjá tí nýggju føroysku oljuvinnuni, at slík signal verða send út um allan heim. Og tí kann eg ikki nóg sterkt undirstrika, at út frá tí núgaldandi politisku skipanini í Føroyum er eingin ivi um, at avtalan, sum er gjørd við donsku stjórnina og sum eisini Halgir W. Poulsen, advokatur hevur víst á, heldur. Og tað er hana vit taka sum grundarlag fyri tí kompetansu, sum vit hava. Lat okkum tí taka hetta sum ein storm í einum vatnglasi og sum einki hevur við veruleikan at gera.

Anfinn Kallsberg vísir annars á, at avtalan, sum vit hava gjørt við danir, snýr seg ikki um at eiga undirgrundina, men at hava ræðisrætt ella ognarrætt til ráevni í undirgrundini. Tað er ein stórur munur á hesum. Kemur tú so inn á suverenitetin tvs. »højhedsretten«, tá er tað ein heilt annar spurningur. Løgmaður sigur víðari, at er tað hetta, sum fyrrverandi embætismaðurin í Tinganesi sipar til, tá hann úttalar seg til útvarpið, so hevur hann eisini rætt í tí, nevniliga at vit hava ikki »overhøjhedsretten« á føroyskum landaella sjóøki.

Løgmaður heldur tað tó ikki kann koma uppá tal, at danir kunnu krevja rættin til møguligar inntøkur frá eini møguligari oljuvinnu. –Tá fari eg at siga sum Halgir W. Poulsen, at tá skjýtur man allar galdandi skipanir til botns.

Anfinn Kallsberg, løgmaður sigur annars, at kemur tað hartil, tað gleðiliga, at tað verður funnin olja í føroysku undirgrundini, so er tann avtalan eisini greið, at tað hevur við sær samráðingar um blokkin. – Vit hava so haraftrat eina avtalu við donsku stjórnina um afturgjalding av skuld, har 500 mill. kr. eru niðurfrystar fram til ár 2018, og skal einans gjaldast, um tað koma inntøkur frá oljuvinnuni. Koma ongar, so verða tær strikaðar. Vit hava tí heilt klokkuklárar avtalur við donsku stjórnina, hvat hendir, um so er, at vit fáa inntøkur frá oljuvinnuni.

Anfinn Kallsberg sigur, at tað er ikki nakað nýtt, at bæði tann undanfarna stjórnin hjá Schluter og tann núverandi hjá Nyrup hava váttað, at tað eru føroyingar, sum hava ognarrættin til eitt møguligt ríkidømi í undirgrundini. Hetta hava teir í og við at teir hava verið við til at gera umrøddu avtalur.

## Nyrup váttar

Í samrøðu við Útvarpið mikudagin ger danski forsætisráðharrin Poul Nyrup Rasmussen enn einaferð greitt, at føroyingar eiga rættin til rávevni í undirgrundini, og at tann avtalan, sum føroyingar gjørdu við danir í 1992 stendur við og hevur danska stjórnin onga ætlan um at taka hana aftur.

gult cyan magenta svart



# Alnót tímir ikki at eita Alnót

**Longu áðrenn fjarskiftisfyritøkan Alnót er komin á marknaðin við tænastum sínum, broytir fyritøkan nú navn fyri aðru ferð. Navnið Alnót egnar seg ikki til fyritøkuna, heldur stjórin, Bjarni A. Bjarnason.**

NAVNABROYTING
*Rúnar Reistrup*



Fyrst at hon VITA Net, men mátti broyta navn, tá tað gjørdist greitt, at VITA margarin var eitt skrásett vørumerki, og at navnið tískil ikki kundi nýtast av øðrum. Nýggja navnið gjørdist Alnót íblást av nýggja føroyska heitinum fyri internet.

Men hetta navnið hóvar ikki longur fyritøkuni, og í dag fær hon sítt triðja navn. Navnið verður avdúkað, tá Alnót fyrrapartin í dag hevur móttøku í hølum sínum á Óðinshædd. Tá fer fyritøkan eisini at kunngera eitt høvuðssponsorat og sýna fram tann litin, sum føroysk fjarskiftisviðskiftafólk skulu kenna fyritøkuna aftur á í framtíðini.

## Navnið dekkar ikki

At skifta navn er ikki ókent í fjarskiftisheiminum. Telefonverk Føroya Løgtings skifti navn til Føroya Tele, og fyrrverandi statsátta danska telefonverkið, ið fyri ikki so langari tíð síðan broytti navn til Tele Danmark, broytti í farna mánað aftur navn, hesuferð til TDC.

Men tað er ikki fyri at líkjast hesum fyritøkum, at Alnót nú ikki longur tímir at eita Alnót. Orsøkin er, at Alnót er vaksin burtur úr heitinum.

– Alnót er ikki dekkandi fyri tað virksemi, sum vit fara í gongd við. Alnót er eitt orð fyri internet, men vit fevna um so nógv annað enn bara internet, sigur Bjarni A. Bjarnason, stjóri á fjarskiftisfyritøkuni.

Navnið var sum so í lagi, tá tað var valt. Tá vóru ætlaninar við fyritøkuni fyrst og fremst at veita internetsamband. Men síðan tá eru nýggir eigarar komnir til við væl størri kapitali og ambitiónirnar eru blivnar meira umfatandi.

– Harafturat er tað eitt sindur ivasamt, um orðið alnót er eitt hóskandi føroyskt heiti at geva internetinum, so vit valdu bara at sleppa okkum heilt av við tað, sigur Bjarni A. Bjarnason, stjóri.

Nýggja navnið er styttri, og sambært fyritøkuni meira fangandi, enn tað gamla.

## Vilja hava fimtingin

Tá fyritøkan Alnót um ein ella hálvanannnan mánað fer á marknaðin við fastnettelefon- og internettænastum, er tað við tí fyri eyga at fáa ein stóran part av marknaðinum upp á stutta tíð.

– Okkara fyrsta mál er, at vit eftir einum ári skulu hava ein fimtapart av marknaðinum, sigur stjórin.

Í løtuni er talið á vanligum telefonfeløgum fimmogtjúgu túsund, og internetfelagarnir eru einir tólv túsund í tali. Talan er soleiðis um at í minsta lagi sjeytúsund viðskiftafólk skulu skifta fjarkiftisveitara, um Alnót skal røkka sínum máli. Harumframt ætlar fyritøkan sær eisini at bjóða út fartelefontænastur seinni í ár.

Tekniska útgerðin hjá Alnót er komin til landið og verður í løtuni sett upp og roynd og verður tikin alment í nýtslu so skjótt sum allir byrjunartrupulleikar eru beindir burtur.

# Løgmaður samdur við Atla Dam

OLJUVINNA
*Jan Müller*

Í samrøðu við Ekstrablaðið fyrr í vikuni sigur fyrrverandi løgmaður Atli Dam seg bera ótta fyri gongdini í eini føroyskari oljuvinnu. Hann sigur seg m.a.bera ótta fyri, at føroyingar ikki fara at duga at handfara møguligar oljuinntøkur á rættan hátt. -Sum politikari kann tað vera torført at skula leggja rygg til at seta hesar mongu pengar á eitt trygt stað, soleiðis at teir kunnu verða við til at loysa nakrar av framtíðar trupulleikunum sigur Atli Dam.

Núverandi løgmaður Anfinn Kallsberg sigur seg vera fullkomiliga samdan við Atla Dam í hesum máli: – Eg havi eisini nevnt hetta bæði í míni løgmansrøðu og ikki minst í nýggjársrøðuni: at tað er ikki bara at gilt síða. Men at vit skulu verða fyrireikað uppá at syrgja fyri at fóta okkum mentanarliga og ikki minst fíggjarliga, um tað skuldi hent, at vit fingu eina virkna oljuvinnu.

Anfinn Kallsberg heldur sjálvur, at hetta landsstýrið hevur ikki tikið til óráð í fyrireikingunum til eina komandi oljuvinnu: – Vit hava arbeitt soleiðis í landsstýrinum, sum um at tað kemur ein oljuvinna, men hinvegin hava vit lagt tingini til rættis reint búskaparliga, at fáa vit eina oljuvinnu, so eru vit fyrireikaðir uppá, at pengarnir skulu ikki oyðileggja tað føroyska samfelagið og búskapin her. Eg havi tí heldur ikki gjørt mær nakrar tankar um inntøkur frá oljuvinnuni, nú vit als ikki vita, um olja er her og í nóg stórum mongum, at lønandi framleiðsla kann fara í gongd. Men koma inntøkur frá eini slíkari vinnu, so er tað gott, og tá mugu vit verða fyrireikað uppá, at tær koma føroyingum til góðar í allari framtíð. So her eri eg púra samdur við fyrrverandi løgmann Atla Dam.

# Gulli aftur á pallin

**Gulli Johansen fer at syngja um menniskjaligt kaos, tá hann fer á pallin í næsta innleiðandi umfarinum í Prix Føroyum**

TÓNLEIKUR

Svakur musikkur og brøl er tað fyrsta, ein hoyrir, tá ein støkkur inn á gólvið hjá Gulla »Human Kaos« fyri at gera eina samrøðu við hann.

Gulli, sum kallaði seg Interneal Healing í seinasta Prix Føroyum, hevur nú valt at kallað seg Human Kaos.

Og tað er heldur ikki uttan orsøk, at hann hevur valt at gera tað, tí tað hann syngur um hesaferð er incest, foreldrakontrol og rotinskap.

## Techno-ørskapur

Tónleikurin, sum Gulli spældi í Prix Føroyum seinast, kemur ikki í nánd av tí, sum hann hevur megnað at skapt í ár. Síðsta ár sang hann við grótharðari rockrødd um Jesus, iva og trúgv. Í ár verður tað harður Techno & Trash tónleikur um onnur evni.

Programmið hjá Gulla byrjar við kaos og flýtur síðani ávegis til techno-ørskap.

Aldursbólkurin, sum Gulli fer at leggja seg eftir at spæla fyri, eru tey undir 20 ár – og helst teimum, sum dáma techno og garvillan trash-tónleik. Og Gulli fortelur, at um fólkini í hansara málbólki dáma tað, ja, so kann hann ikki annað enn at vera vælnøgdur.

## Kaos

Tá hann so verður spurdur um, hví hann skifti navnið Internal Healing til Human Kaos var svarið:

– Tí teir tekstir, eg skrivaði fyrr, snúðu seg allir um Gud, men nú snúgva teir seg um menniskjanligt kaos, tí havi eg sjálvtsagt broytt navnið til Human Kaos.

Hvat við kærleikssangum?

– Havi gjørt onkrar, faktist tveir. Men tað er ikki nakað, eg satsi uppá í framtíðini!

Hevur tú nakra framtíðarvón innan tónleik?

– Geva okkurt út, sum tey dáma.

Og ætlar tú tær víðari í Prix?!?

– Eg ætli mær víðari, men tað avgera dómarararnir.

## Onnur skrá

Gulli hevði eitt sera gott og øðrvísi program á seinasta Prixnum, har hann eisini sang ein sang hjá Doctor Bombay.

Í ár hevur Gulli so eitt annað program, har hann ikki fer at syngja nakran sang hjá nøkrum øðrum – bara sítt egna tilfar.

So tað verður spennandi, um Gulli megnar at fáa áhoyrarnir at flippa totalt út, líkasum hann gjørdi fyri tveimun árum síðani.